## Eingin avgerð um Afghanistan

Enn hevur amerikanski forsetin, Barack Obama, ikki gjørt av, um hann skal senda fleiri hermenn til Afghanistan. Ovastin fyri teimum amerikonsku herdeildunum har, generalurin Stanley McChrystal, hevur biðið forsetan senda sær 40.000 hermenn afturat, so hann kann herða bardagan við Taliban og al-Qaeda. Sambært amerikonskum fjølmiðlum er forsetin sinnaður at senda fleiri hermenn avstað, men talið er ikki ásett enn. Summir fjølmiðlar vænta, at Obama fer at senda umleið 30.000 hermenn afturat til Afghanistan.



## Týskur útflutningsvøkstur

Í seinastuni hava hagtøl víst, at vend er komin í tann týska búskapin, og í gjár komu tøl, sum benda á, at framgongdin er uppaftur størri, enn serfrøðingarnir hava hildið. Hesaferð vístu tølini, at týski útflutningurin í september var heili 3,8 prosent størri enn í august, og tað var nógv meiri enn mett, skrivar DPA. Serfrøðingarnir siga tann stóra vøksturin vera hugvekjandi, tá hugsað verður um, at evran er styrkt munandi mótvegis dollaranum, so ein evra nú togar í hálvan annan dollara. Týskir búskaparfrøðingar vænta, at vøksturin í landsins búskapi fer at standa við árið út.

skuldi verið farið eftir bankunum, meðan Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Sjálvsstýrisflokkurin stórligaivast, um kappingarráðið kann gera nakað, tí fleiri bankar koyra tungt í løtuni og tí vinna teir helst ikki ov nógvan pening.

### Realkreditt

Seinasta hugskotið hjá politisku flokkunum er at gera ein almennan føroyskan realkreditt, sum skal kunna veita fígging á landi, og ikki bara á sjógvi, sum tað er í dag.

Hetta hugskotið siga tríggir ymiskir flokkar seg eiga.

Javnaðarflokkurin kallar tað fyri eitt hugskot, sum kom eftir landsfundin um vikuskiftið.

Tjóðveldi hevur spurt Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, hví støðan er sum hon er, og annars ákært landsstýrið fyri at gera eitt og siga eitt annað.

Tjóðveldi vil eisini hava realkreditt á landi. Eisini sigur Tjóðveldi, at hugskotið hjá Javnaðarflokkinum er eitt kopi av einum uppskoti hjá Tjóðveldi.

Sjálvsstýrisflokkurin arbeiðir í løtuni við uppskoti, at gera ein almennan føroyska realkreditt, og fer sambært Kára á Rógvi at bera hetta uppskot niðan í Løgtingið í næstum.

– Uppskotið er at skipa ein føroyskan realkredittstovn, sum skal syrgja fyri, at sethúsaeigarar fáa ódýrari fígging og gevur íleggjarum eitt trygt pappír, tí váðin verður so spejddur, sigur Kári á Rógvi, sum umboðar Sjálvsstýrisflokkin í hesum máli.

Miðflokkurin hevur enn ikki veruliga viðgjørt málið, men formaðurin í flokkinum angrar, at Føroya Banki varð seldur, og heldur avgjørt, at eitt føroyskt tilboð skal vera til fígging, sum hevur menniskjuna í fokus. Tað vil siga lægri rentu.

Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin meta hinvegin, at tað ikki er eitt gott hugskot at skipa ein almennan føroyskan realkreditt, tí flokkarnir meta at tað eigur at vera avmarkað, hvussu nógvar bankar tað almenna eigur. Umframt, at serliga Fólkaflokkurin ikki vil hava alment stuðlað virksemi.

Tí kunnu vit varisliga staðfesta, at tað í løtuni er eitt slag av meiriluta á tingi, sum fegin vil hava føroyskan realkreditt á landi, og at allir flokkar meta rentuna vera ov høga. Nýggi realurin skal somuleiðis uppfylla ynskið hjá meirilutanum um økta kapping við fígging í Føroyum.

# Framhald av valstríði

**Javnaðarflokkurin legði um vikuskifti, sum fyrsti samgonguflokkur, hugskotið fram at skipa føroyskan almennan realkreditt. Fleiri flokkar halda uppá, at talan er um valflesk til eitt møguligt val, men Javnaðarflokkurin noktar fyri hesum**

HUGSKOT
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hetta er eitt framhald av valstríðnum, sum Javnaðarflokkurin hevur koyrt í eina tíð.

Tað sigur Jenis av Rana, nú Javnaðarflokkurin, sum einasti samgonguflokkur, er komin við hugskotinum at skipa almennan føroyskan realkreditt.

– Eg eri ikki lækni, men var talan um ein patient, so hevði eg hildið, at tað var ein patientur, sum ikki livdi væl, sigur Kári P. Højgaard um sitandi samgongu og leggur afturat, at tað undrar hann, at so nógvar rakettir verða skotnar upp í luftina, tí hann heldur, at onki uppskot er gjøgnumarbeitt og at allir flokkar og landsstýrismenn arbeiða í sjálvdrátti.

Høgni Hoydal í Tjóðveldi heldur tað sama.

– Tað tykist sum javnaðarflokkurin er í bili og roynir at blinka til vinstru, men altíð vendir til høgru. Verður hetta hugskot ikki veruleiki, so er tað bara valflesk.

Men tað er ikki bara andstøðan, sum leggur upp til at Javnaðarflokkurin førir valstríð.

– Tað mást tú spyrja Javnaðarflokkin um, men teir hava broytt máta at uppføra seg. Tó skal eg ikki siga, at teir føra valstríð, sigur Jørgen Niclasen, sum sigur seg hava ein vón at samgongan heldur til nýggjárs.

Kaj Leo er meiri bjartskygdur.

– At føra valstríð vildi verið kamikazepolitikkur, sigur samgonguleiðarin um spurningin, um Javnaðarflokkurin førir valstríð.

Hann leggur afturat, at hann ikki hevur sæð tað sum, at flokkurin er í valstríðið, tí teir siga, at teir hava tað gott í samgonguni, og hetta tekur løgmaður fyri fult.

Javnaðarflokkurin avnoktar blankt, at hann við hesum førir valstríð, sum Miðflokkur serliga leggur upp til.

– Tað er ein viðmerking, sum eg ikki havi nakra viðmerking til. Kann Javnaðarflokkurin ikki hava meiningar, so veit eg ikki hvat skal bera til, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur síðani afturat, at hetta onki hevur við valstríð at gera.

Somuleiðis sigur hann, at orsøkin til, at tað kanska kann tykjast sum at Javnaðarflokkurin ger meira burturúr, er tí hann hevur sagt ov lítið áðrenn.

– Eg kann lasta meg sjálvan við, at eg var í so passivur, tá eg byrjaði sum fíggjarmálaráðharri. Tað er møguligt, at eg geri tað rætta nú, og tað skeiva tá, heldur Jóannes Eidesgaard.

## Politikarar flyta fokus

Janus Petersen, formaður í felagnum føroyskir peningastovnar, heldur ikki, at bankarnir eru ólagaligir og hann heldur heldur ikki, at rentan er ov høg. Hann metir hinvegin, at politikarar flyta fokus frá egnum avbjóðingum við at kritisera bankarnar.

Hetta segði hann við Kringvarp Føroya í gjár.

– Eg haldi tað vera undarliga, at vit nú fáa kritikk, tí samlað er ikki avlop í sektorinum í ár, segði Janus Petersen við Kringvarpið í gjár.

Hann greiddi somuleiðis frá, at rentur og bankapakkar kosta sítt, umframt, at útreiðslurnar til tap eru øktar munandi.

Tí heldur hann ikki, at politikarar kunnu ákæra bankarnar fyri at vinna ov nógvan pening.

– Mann skal ikki fýlast á, at onkur vinnur pening. Tað er ein nógv størri trupulleiki, at tað almenna hevur so stórt hall, heldur Janus Petersen.

Kritikkinum, at rentan er ov høg vil hann ikki hoyra nakað um.

– Politikarar hava ikki lagt til merkis, at føroyskir bankar hava fingið til vega sera bílig lán til sethús.

– Vit hava nú lán, sum hava niður í næstan trý prosent rentu, og hetta er óhoyrt í føroyskari søgu, greiddi Janus Petersen frá í tíðindunum hjá Kringvarpinum í gjár.

Um kappingarráðið segði Janus Petersen, at tað skal vera vælkomið, tí peningastovnarnir eru longu undir nógvum ymiskum eftirlitinum. Men um tað er nakað at fara eftir, vildi Janus Petersen ikki siga nakað um. Hann vísti nevniliga til kappingarráðið.



*Formaðurin í felagnum føroyskir peningastovnar heldur ikki, at kritikkurin av peningastovnunum hevur nakra orsøk*